## Tiltøk

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, vitjan av Andreas, við temanum »åbne dør«, missiónsfilmur verður vístur, kl. 18 evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 17 landsbøn, kl. 19 ungdómskvøld.
Sunnudagin kl. 11 familjumøti.

### Samkoman Immanuel
Í kvøld Kongsins Herlið kl. 20. 8 ár og eldri eru vælkomin.

### Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

### KFUM og KFUK í Havn
Fríggjadagin kl. 20 í KFUM: Opið hús, fyri ung.

### Frelsunarherurin Tórshavn
Fríggjadagin kl. 20.30 ungdómsklubbur.
Sunnudagin kl. 11 møti, major Tjåland talar. Eingin sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti, heimaforbundsdagur, Sofía Jacobsen talar. Systrarnar luttaka á møtinum. Møti fyri børn hvønn dag frá mánadagin 9.okt. til fríggjadagin 13. okt. kl. 17-18.

### Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið kl. 18-19 A.T.A.P. (barnaklubbi.
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli.
Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 8.30-9.30. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla ongin sunnudagsskúli vegna heystfrí. Kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Eyðun Jacobsen, lovsongsleiðara.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Elly og Louis Durhuus, Brattalíð 15. Øll eru vælkomin.

### Filadelfia, Sundalagi
Í dag kl. 20 verður møti í Hósvík við Vilhelm Langemyr.
Sunnudagin kl. 18 verður møti við Sonna Djurhuus.

### Saron, Vestmanna
Í kvøld onki møti, vegna møti í Filadelfia Hósvík.
Leygardagin kl. 20 møti í skúlaauluni í Vestmanna við Wilhelm Langemyr.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti í Saron, Wilhelm Langemyr talar.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Norðstreymoyingar
Møtirøðin vil Wilhelm Langemyr heldur áfram í Filadelfia í Hósvík í kvøld kl. 20.
Leygardagin kl. 20 møti í skúlaauluni í Vestmanna.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Leirvík
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Ung úr Leirvík luttaka við orði, vitnisburði og undirhaldi. Aftaná verður drekka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Ørkin, Saltangará
Leygardagin kl. 20 evangeliskt møti í losjuni í Gøtu.
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará.
Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Jonnu og Palla Højgård, Saltangará.
Hósdagin kl. 20 bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin.

### Keldan, Skálafirði
U-Alfa legan byrjar fríggjakvøldið kl. 18.
Vikuskiftisfundir við Svenna, sangevangelistur frá Norra, leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 17. Barnamøti kl. 17. Tú ert vælkomin í Kelduna.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður í missiónshúsinum á Tvøroyri fríggjakvøldið 6. okt. kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Kirstein og Noru. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

### Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagur 2.10.*
kl. 10-12 Ítriv
kl. 14-18 Fyrireiking til framsýningina
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikud.
kl. 15-18 Framsýning av bundnum lutum til Móður Theresufelagsskapin alla vikuna, inngongd frá Grasagarði.
kl. 15-16 Barnaspøl fyrr og nú. Vitjan av lærarskúla- og pedagognæmingum
*Týsdagur 3.10.*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Havnaprát
*Mikudagur 4.10.*
kl. 10-13 Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 14.30 Túrur
*Hósdagur 5.10.*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagur 6.10.*
kl. 10-17 Opið hús.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

### Vágs Matmøðrafelag
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.

### Blái Krossur
bjóðar til eftirviðgerð hvørt mánakvøld á skrivstovuni hjá Bláa Krossi á Glyvrum, kl. 20-21.30. Nærri fæst at vita á tlf. 315575.

### AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

### Føroyskt-Amerikanskt Vinafelag
Samkoma á Hotel Eiði leygardagin 14. okt. kl. 15. Har kemur Sverre Kruse, sonur kenda lsitamálaran, Niels Kruse, at siga frá ymiskum spennandi hendingum og upplivingum, sum honum hevur verið fyri á sjónum. Hann búði í USA í mong ár og hann er amerikanskur ríkisborgari. Øll eru vælkomin, limur ella ikki. Kostnaður 50 kr.

### LISA
*skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya* í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

### LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

### Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

### Amnesty International Føroya deild
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

### Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

### Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
er opin hvørt mikukvøld kl. 20.00.
1., 2. og 4. hvørt mikukvøld: drekkamuður, óformelt orðaskifti og upplýsing um Bahá'í.
3. hvørt mikukvøld: bønarmøti og drekkamuður aftaná.
***Bahá'í-samfelagið í Tórshavn***

### Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

### Javni
*Skrivstovan er opin hesar tíðir:*
Mánadag stongt!
Týsdag-hósdag kl. 11-14.
Fríggjadag kl. 11-15.
Tlf.: 314827 ella 216510
Fax: 310557
E-mail:
javni@post.olivant.fo

### Giktafelag Føroya
*MBF Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 fax 310813*
Opið týs. og hósdag kl. 10-13.
Foreldrabólkurin: Betty og Noel Joensen, tlf. 457337 eftir arbeiðstíð.
Bólkurin Ung: Sára Tummassardóttir, tlf. 373106.

### Føroya Astma/ Allergifelag
*MBF-húsið*
*Íslandsvegur 10c*
*Tlf./fax 311419*
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

### Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

### Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

### Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

---

### Gullbrúdleyp
**Mánadagin 9. okt. hava hjúnini Sonja og Jógvan (Egga) Rasmussen, Strendur, gullbrúdleyp. Vælkomst verður í Kelduni í Skálafirði kl. 19.**

### 70 ár
**Í dag, fríggjadagin, verður Poul E. Poulsen – Poul á Skalla, Hvalba 70 ár. Dagurin verður hildin heima.**

### 85 ár
**Leygardagin 07. okt. verður Karl Jespersen, Tvøroyri, 85 ár. Dagurin verður hildin við familjuni.**

---

### Konfirmantar 8. okt. í Vesturkirkjuni
Rannvá Lamhauge Beder, á Teigi 8, 100 Tórshavn
Ragnhild á Plógv Hansen, Bóndaheygur 9, 100 Tórshavn
Gyða Barbara Jacobæus, Fjalsgøta 46, 100 Tórshavn
Simona Bjarkadóttir Jensen, Heiðatún 9, 160 Argir
Benadikta Johannesen, Jákup Dahlsgøta 1, 100 Tórshavn
Lisa í Garði Patursson, 175 Kirkjubøur
Randi Skylvsdóttir Wardum, Undir Gráasteini 32, 100 Tórshavn
Marno Havstein Andreasson, Traðagøta 1, 160 Argir
Bogi Augustinussen, Suðurstíggur 12, 160 Argir
Niclas Olaf Martinsson Berg, Øksnagerði 1B, 100 Tórshavn
Tummas Petur Bisp, Guttormsgøta 12, 188 Hoyvík
Rani Gregoriussen,Granagøta 16, 100 Tórshavn
Rógvi Nolsøe Hansen, Folagerði 11, 100 Tórshavn
Fríði Johan Jacobsen, Brattalíð 20, 100 Tórshavn
Nicodemus Rasmussen Líggjasson, Lambagerði 5, 100 Tórshavn
Dánjal Michaelsen, Undir Gráasteini 5, 100 Tórshavn
Helgi Debes Michelsen, Hvannasundsgøta 4, 100 Tórshavn
Bjarti Nattestad Petersen, Suðuroyarvegur 8, 100 Tórshavn

### Konfirmantar 8. okt. í Havnar kirkju
Pól Andreassen, Traðarvegur 7
Rógvi Danielsen, Korkagøta 1
Tormóður Djurhuus, Millum Gilja 3
Rani Ellingsgaard, Javnagøta 3
Heini Aabak Hansen, Marinargøta 16
Hallur Helmsdal, Lýðarsvegur 3
Jón Klæmint Hofgaard, Berjabrekka 201
Sonni Annfinnsson Jacobsen, Niðaragøta 60
Niels Tórur Eysturtún Jensen, Villingardalsvegur 19
Gunnar Joensen, Aggusteinusvegur 3
Kenneth Joensen, Onnugøta 8
Kári Holm Johannesen, Turiðargøta 14
Rói Wardum, Lýðarsvegur 10
Rói Debes Winthereig, Turiðargøta 8
Uni Debes Winthereig, Turiðargøta 8
Durita Dahl Andreasen, Millum Gilja 60
Anna Berg, Børkugøta 4
Katrina Clementsen, Korkagøta 13
Herbjørg Leila Eliasen, Gillagøta 15
Anna Knútsdóttir Gray, Móritsarvegur 9
Aimee Hansen, Eystari ringvegur 10B
Lilian Hellisdal, Smærugøta 9 C
Bára Jákupsdóttir Jakobsen, Láarvegur 18
Ása Dam á Neystabø, Børkugøta 29
Joan Jastrid Simonsen, Traðarbrekka 2
Hilma Sofía Skarðheim, 410 Kollafjørður

### Konfirmantar 8. okt. kl. 11 í Tvøroyrar kirkju
Eir Lisberg, Øravík
Elin Kristianna Haugaard Lisberg, Sjúkhúsbrekkan
Irena Harriette Jespersen, í Líðini
Birita í Dali, við Rangá
Lív Steinkross, í Trongisvági
Bára Thorsteinsson Djurhuus, í Trongisvági
Janus Jespersen, í Líðini
Karl Andras Poulsen, í Fámjin
Nils Martin Olsson Djurhuus, á Tanganum
Sjúrður Mortan Thorsteinsson, á Trovheyggi
Kristian Eli Holmsund, í Trongisvági
Jóhan Petur Jacobsen, í Valinum

### Konfirmantar 8 okt. í Vestamanna kirkju
Birita Sofía Hendriksdóttir
Gunn Himmeland Jacobsen
Arnleyg Victoria Johansen
Elisabeth Petersen
Herborg Silja Strøm
Sigrið Zachariasen
Sebastian Eriksen
Heini Mohr Johansen
Hans Fríðálv Johannesen



### Hirtshals
Fríggjakvøldið 6. okt. verður føroyskt møti í missiónshúsinum kl. 19.30 við Hera Elttør o.ø. Høvi verður at geva eina gávu til arbeiðið. Kaffi o.a. verður eftir møti.
**Ålborg:** Føroyskt møti verður í Ålborg missiónshúsinum (Jernbanegade 16) sunnukvøldið kl. 19 við Hera Alttør. Høvi verður at geva eina gávu til arbeiðið. Kaffi verður eftir møti.

### Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík
Møtini byrja nú sunnudagin 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

### Nærvarpið LUMI radio í Aalborg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

### Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

### Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

### Føroysk møti
Føroysk møti eru triðja leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

### Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Heimamissiónin
Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/ 26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

## VALUTAKURSIR

| | | 05.10.00 | Ultimo september |
|---|---|---|---|
| *USA* | **Dollarar** | 853,1700 | 846,5300 |
| *Bretland* | **Pund** | 1241,1600 | 1240,0100 |
| *Týskland* | **Markur** | 380,2500 | 381,2300 |
| *Svøríki* | **Króna** | 87,1400 | 87,4000 |
| *Noreg* | **Króna** | 92,7000 | 92,8300 |
| *Frakland* | **Frankur** | 113,5900 | 113,6700 |
| *Belgia* | **Frankur** | 18,4700 | 18,4830 |
| *Sveits* | **Frankur** | 490,8600 | 488,7700 |
| *Holland* | **Gyllin** | 338,1000 | 338,3500 |
| *Italia* | **Liri** | 0,3848 | 0,3851 |
| *Finnland* | **Markur** | 125,3100 | 125,4000 |
| *Ísland* | **Króna** | 10,2000 | 10,2000 |
| *Eysturríki* | **Skillingur** | 54,1460 | 54,1860 |
| *Spania* | **Pesetas** | 4,4780 | 4,4810 |
| *Portugal* | **Escudos** | 3,7160 | 3,7190 |
| *Kanada* | **Dollari** | 569,4900 | 564,0100 |
| *Grikkaland* | **Drakmur** | 2,1950 | 2,1970 |
| *Japan* | **Yen** | 7,8067 | 7,8453 |
| *Írland* | **Pund** | 946,0400 | 946,7400 |
| | **Evra** | 745,0700 | 745,6200 |

FØROYA SPARIKASSI

HAVNAR BIO

# Hallow Man – ósjónligur

Søgan um ósjónliga mannin er ein klassikari bæði sum lesnaður og í filmsheiminum - serliga á stóra løriftinum, har fólkini aftan fyri filmin rættuliga hava kunnað spælt sær við tøkniligu møguleikunum og bøtt um tað ósjónliga. Í hondunum á thrillara- og actionmeistaranum, Paul Verhoeven og hansara serliga effectliði, er komið fram til higartil bestu skapan av ósjónliga manninum, sum nú kann upplivast í actionfylta spenningsfilminum, Hollow Man.

Tankin um at gerast ósjónligur hevur hugtikið mong. Evnið, sum er endurtikið ótalligar ferðir, verður nú viðgjørt í hesum filminum, sum verður frumframførdur í Havnar Bio í kvøld.

Filmurin snýr seg geniala vísundamannin, Sebastian Caine (Kevin Bacon), sum hevur funnið fram til eit serum, sum kann gera menniskju fullkomiliga ósjónlig. Hetta førir við sær eina ófatiliga m egi, sum tykist at kvala allar moralskar skruplur, og sum viðførir ein øðiligan enda.

– Tað er hugtakandi, hvat vit kunnu gera, sigur Caine

– Tá tú ikki longur skalt síggja teg sjálvan í speglinum…

# TITAN

– Vit sóknast eftir eini søgu, sum byrjar við einum jarðsjálvta og so arbeiðir upp ímóti einum klimaks.

Soleiðis ljóðaði uppskriftin hjá Sam Goldwyn upp á ein góðan film.

Og úrslitið er filmurin TITAN.

Vit eru í ár 3028. Menniskjað hevur fyri langari tíð síðani lagt alt universið undir seg. Ferðir til fjarar galaksar eru hvønn dagskostur. Jørðin er tó framvegis heim menniskjans.

Men menniskjað hevur fingið ein stóran og øðiligan fígginda: Drej'ararnir. Eitt løgið slag, av reinari orku – og tað eru teir, sum oyða okkara klótu.

Sam Tucker er professarin, sum hevur átikið sær at bjarga jørðini, og hann má lata lítla son sín eftir, Cale, í varpveitslu hjá øðrum, innan hann fer á sína lívs síðstu missión.

Trettan ár seinni er Cale vorðin ein vaksin ungur maður. Sum hini, ið eftir liva, er hann tvungin at sveima runt í rúmdini sum flótti, undirklassaborgari og trælaarbeiðari millum løgnar skapningar frá øðrum universum og alsamt jagstraður av timum øðiligu Drej'unum.

---




**Frumsýning**
Fríggjadagin 06.10. kl. 21⁰⁰ Fríggjadagin 06.10. kl. 23³⁰
Leygardagin 07.10. kl. 21⁰⁰ Leygardagin 07.10. kl. 23³⁰
Sunnudagin 08.10. kl. 20⁰⁰ Sunnudagin 08.10. kl. 22³⁰

**Sí eisini SvF tekstvarp s. 611–613**

**HAVNAR BIO**
**✶ Tlf. 311956 ✶**




**Frumsýning – Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 06.10. kl. 17⁰⁰ Fríggjadagin 06.10. kl. 19⁰⁰
Leygardagin 07.10. kl. 17⁰⁰ Leygardagin 07.10. kl. 19⁰⁰
Sunnudagin 08.10. kl. 16⁰⁰ Sunnudagin 08.10. kl. 18⁰⁰




Fríggjadagin 06.10. kl. 18¹⁵ Fríggjadagin 06.10. kl. 20³⁰
Leygardagin 07.10. kl. 18¹⁵ Leygardagin 07.10. kl. 20³⁰
Sunnudagin 08.10. kl. 17¹⁵ Sunnudagin 08.10. kl. 19³⁰




Fríggjadagin 06.10. kl. 23⁰⁰ Leygardagin 07.10. kl. 23⁰⁰
Sunnudagin 08.10. kl. 22⁰⁰

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**
**Fríggjadagin 13.10.**




**Frumsýning**
**Fríggjadagin 13.10.**